Heilsustandurin hjá børnunum undir 15 ár í Eiðis læknadømi.

Eftir R. K. Rasmussen.

Henda rannsókn fevnir um øll børn undir 15 ár í Eiðis læknadømi, og hon varð gjørd í tíðini 1945—50, summpart í skúlunum, summpart inni hjá fólki og á Eiði (157 børn) í læknahúsunum. 9 av børnunum vóru burturstødd rannsóknardagin. Teirra millum ein 9 mánaðir gl. drongur,ið var skeivføttur vinstrumegin — hann var júst tá lagdur inn á sjúkrahús — og ein genta, knappliga 9 ár, sum var á einum heimi fyri ófullfør.

Tað vóru ikki færri enn 7 ófullfør børn, umframt omanfyri nevndu gentu í Eiðis læknadømi. Trý teirra (1, 2 og 6 ára gomul) vóru at kalla úrsýn til andaligar gávur og eru tí ikki tikin uppí. Hini fýra (6, 7, 8 og 11 ára gl.) vóru heldur frægari; 3 tey elstu fingust við at ganga eitt sindur í skúla, og øll fýra koma við í rannsóknina javnbjóðis hinum børnunum.

Umframt gentuna og dreingin, sum vóru ávikavist á sjúkrahúsi og í heimi fyri ófullfør, vóru sum nevnt sjey,ið av tilvild vóru búrturstødd. Fyri tey komu á ein hátt 7 fremmandabørn, ið búðu fyribils í nøkrum av bygdunum í læknaøkinum, júst tá ið rannsóknin har fór fram. Hini 7 burturstøddu børnini vóru tó nakað væl eldri enn

fremmandabørnini: Fimm vóru meira enn 12 ár (av teimum 4 meira enn 14 ár) og tvey ímillum 4 og 7 ár. Tey fyribils hjáverandi børnini vóru øll 10 ára gomul ella minni. Á hendan hátt komu at vera tilsamans 727 børn (353 ♂, 374 ♀) við í rannsóknini. Fólkatalið í læknadøminum var úti við 2300. Børnini undir 15 ár vóru tá 32%, hetta um vit telja tey 4 ófullføru og dreingin á sjúkrahúsinum uppí ella ikki.

Arbeiðið vardi sum nevnt í 6 ár, frá 1945 til 1950, og fór fram soleiðis, at 2 ella fleiri bygdir vórðu kannaðar hvørt ár. Rannsóknin var fyri tær 18 bygdir, sum leitaðu til lækna á Eiði. Tvær av hesum bygdum við 56 børnum tilsamans eru nú at kalla samankomnar og hava skúla saman. Tær verða í rannsóknini roknaðar sum ein. Í eini aðrari, heilt lítlari bygd var bert eitt barn; tað var flutt til grannabygd. Tað verða so her 16 bygdir. Barnatalið sæst á 1. talvu.

5 bygdir høvdu færri enn 25 børn
5 bygdir høvdu millum 26 og 49 børn
5 bygdir høvdu millum 50 og 74 børn
1 bygd hevði 157 børn

1. talva. Barnatalið í kannaðu bygdunum.

Rannsóknirnar byrjaðu einki ár fyrr enn 1. apríl og endaðu seinast í juli. Í allraflestu bygdunum fóru tær fram í mai og juni. Í einari bygd, við 62 børnum, var neyðugt at drála við rannsóknini, til í august mánað.

Áðrenn farið varð undir arbeiðið, vórðu prentað útfyllingarbløð. Á teimum vóru teigar til: Navn, føðingardag og føðingarár, rannsóknardagin og fyrr havdar sjúkur. Har afturat: Pirking, hædd, tyngd, land og hæmoglobin. Seinastu tvær rannsóknirnar vórðu tó ikki gjørdar, uttan okkurt var, ið kundi benda á, at ikki var rættvorðið. Her verða

nú settar í bólkar allar tær sjúkur, sum børn tíðum hava ella bera merki eftir.

Fyrst sjón og hoyrn, so um pinkubarnið hevði cranic= tabés, bungutar tubera parietal. et front. og síðan breiddin á fýrstrendu kelduni. Teir fimm bólkarnir, ið so koma, eru um tenn, munn og háls (góma, svølg, mandlur og margføtl= ur (vegetationes adenoides)), húð og hold, avskapingar av bringuni og eitlarnar undir húðini. Síðan ryggurin (kyfosis, scoliosis o. s. fr.), hjarta, lunga, tarmalop (nalvalop og lop fyri rørunum) og beinini (Calvé — Legg — Pertes' og Os= good—Schlatters sjúka, luxatio coxæ cong., føddur við mjadnum úr lið, kálvakníggjaður, hjólbeintur, slættiljaður o. til.).

Tá ið vigað varð og mált og ryggurin varð kannaður, var barnið nakið. Vigað var í hvørji einstakari bygd við fjaðravekt, sum høvundurin hevði við, og sum vísti heil og hálv kg. Vektin omaná var so lítil, at ikki bar til at viga uttan at standa. Tey smáu børnini, ið ikki dugdu at standa ella ganga, vórðu tí vigað í bismara; men hann var ikki altíð tøkur, og nøkur pinkubørn vórðu tí ikki vigað.

Mált varð við centimeturmáli — alla tíðina sama málið; tað varð við teknistift fest í bróstið nakrar fáar cm burtur frá einum durastavi, ið stóð 4—5 cm fram um bróstið. Tann ið málast skuldi, stóð so rættur, sum hann kundi, og vendi bakið og nakkan ímóti bróstinum og centimet= urmálinum. Síðan varð ein lítil rætthyrntur kassi settur á høvdið á barninum, annar endin ímóti bróstinum og cent= imeturmálinum og ein síðan ímóti durastavinum.

Tá ið ryggur og lendar vórðu kannað, stóð nakna barnið við ørmunum niðurvið og bakinum vendum ímóti ljósinum. Tey brek í limalag, sum hvurvu, tá ið barnið rætti seg, so væl tað kundi, verða ikki tald við her.

Mandlur og eitlar hjá øllum børnunum eru kannað. Eis= ini varð kannað eftir margføtlum, um okkurt var, ið bendi tann vegin. Hesi yrkisgøgn og hesir vøkstir verða ikki tikin við her. Bert fá høvdu eitlatrota, og var hann, eitt barn

undantikið, altíð á hálsinum, og lítil. Eingin eitlatroti, ið komin var av tuberklum. Eygnasjúkur koma heldur ikki uppí her, hóast mong børn eru roynd við talvu Snellans. Við tað at hesi 727 børnini eru máld og vigað bert einaferð, er ógjørligt við hvørt einstakt barn at siga tyngdina, sum hon átti at verið, samanborin við hæddina; neyðugt verður tí at lata hesi tøl fara.

Niðan fyri skulu nú verða tikin fram nøkur rannsóknarúrslit. Tað má longu verða sagt, at orðið rachitis (eingilsk sjúka) kemur ikki fyri í hesi grein. Av teim mongu eyðkennum við hesi sjúku eru sera fá — kann vera eingi — ið ikki eins væl stava frá øðrum brekum. Um mong sjúkbrøgdini er nú — mótsett fyrr — álvarsom ósemja, eisini millum teir kønastu: Summir siga, at brøgdini einki hava við rachitis at gera, aðrir afturímóti halda, at tey — kann henda við einstøkum undantøkum — ivaleyst vísa, at barnið hevur hesa sjúku, ella at hon hevur sett varandi merki. Teir eru mangir, ið vilja hava sveitavatnið kannað, áðrenn sjúkan verður avgjørd. Lukkutíð er henda rannsókn ikki neyðug fyri viðgerðina; tí øll børn í Føroyum, bæði bróstabørn og koppabørn, eiga at fáa lýsi bæði vetur og summar.

Høvundurin hevði í 1945 verið lækni á Eiði í 25 ár og hevði tí í varðveitslu sjúkadagbøkur um at kalla hvørt einasta barn, nýføðingarnir undantiknir. Arbeiðið byrjaði tí við einum úrdrátti úr hesum dagbókum. Tað sum nú kemur, er tí ein frágreiðing um tað, ið fram kom við reglubundnu kanningunum, samanbornum við upplýsingum úr dagbókunum. Í mongum førum er hetta tí heilsustandur barnsins frá føðing til kanningardagin.

Í hesum bygdum, ið talan er um, vórðu 8 ferðir bornir í heim tvíburðir, ið allir høvdu verið uppi í her, høvdu teir livað ella verið heima. Hjá tvinnum av tvíburðunum vóru bæði børnini gentur og hjá øðrum tvinnum dreingir. Fimtu tvíburðarnir vóru drongur og genta. Har umframt hevði ein stór genta, ið enn ikki hevði fylt 15 ár, tvíburarsystur, ið tænti í eini bygd uttan fyri Eiðis læknadømi, og

sum tí ikki kemur við. 12 ára gl. drongur hevði havt tví-burðarsystur, sum doyði í føðingini. So vórðu í 1944 bornir í heim tvíburðir — dreingir —ið báðir høvdu komið upp í hesa rannsókn, høvdu teir livað. Men annar doyði í føð-ingini, hin 6 vikur gamal. Afturat hesum 8 tvíburðarpør-unum mega vit taka við ein drong úr aðrari fjarari bygd, og sum frá heilt ungum kom at vera í húsi í einari av teim kannaðu bygdunum. Tvíburðarsystir hansara varð verandi hjá foreldrunum.

1. Tuberklar. Tá ið arbeiðið byrjaði í 1945 var ætlanin, at pirking skuldi vera fastur liður í rannsóknini, og at øll børnini skuldu pirkast. — Í 1946 Calmette-koppaði yvir-læknin V. Magnussen Eiðis læknadømi. Beint frammanundan var at kalla alt fólkið í læknadøminum pirkað og kannað við Mantoux III. Av hesi orsøk fór reglubundna tuberk-ulinrannsóknin fram bert í árunum 1945 og 1946, og bert í 4 bygdum vórðu børnini kannað av høvundanum.

Ungdómurin er ferð eftir ferð pirkaður. Í tíðarskeiðinum februar 1923—oktober 1928 vórðu, umframt onnur, øll børn undir 15 ár pirkað. Talið á hesum børnum var tá 801 (397♂, 404♀), og av teimum vístu 103 ella 13% positivt.

Í 16 ára-skeiðinum 1929—1944 var tuberkulinroynd nýtt í mongum ymissum førum. Var komið fram á nýggjan tilburð við tuberklum vórðu øll í tí húsinum og allir kenningar pirkað, og eisini við hvørt øll børn og ung í bygdini, til at fáa kunnleika um, hvussu víða smittan var komin, ella til at finna smittuberan.

Undan Calmette-koppingini í 1946, kendu vit har tilsam-ans 29 undir 15 ár,ið smitta vóru við tuberklum. Tvey av teim 9 børnunum, ið burturstødd vóru, tá ið rannsóknin fór fram í 1945—50, høvdu pluss; tey koma ikki uppí held-ur enn hini sjey burturstøddu. Men aftur fyri tey koma 2 børn av teim fyribils hjástøddu við positivari tuberkulin-vísing. Yvirlækni V. Magnussen fann trý afturat*) — til-samans 32 (20♂, 12♀) av 727, og verða tað 4%.

*) Eg takki V. Magnussen, yvirlækna, fyri hesa upplýsing.

Helvtin av teim 32 smittaðu børnunum høvdu, sum 2. talva vísir, havt sjúkur,ið stavaðu frá hesi tuberklasmittu. Tær í talvuni nevndu tuberklasjúkurnar eru tílíkar,ið vanliga koma beint eftir smittuna, ella fyrstu mánaðirnar aftaná. Barnið við lungahinnubruna og tuberklum í bringubeininum er einki undantak — seinni nevnda sjúkan tók seg upp 5 mánaðir seinni enn hin.

Fjúrtan vóru farin at vísa positivt uttan tó at hava nakað tekin til sjúku. Táið vísingin — alloftast av tilvild — var vorðin kunnug, var eingin av næstingunum,ið visti at siga nakað um hita,ið ætlandi kundi hava verið smittuhiti. Væl kann hetta vera av tí, at ikki hevur verið givið nóg væl gætur, ella at tað er gloymt. Høvdu øll verið kannað við Røntgen í røttu løtuni, er trúligt, at fleiri trútnir lungnaeitlar og lungnabroytingar vóru funnin. 2. talva hevði tó kann henda verið eitt sindur øðrvísi vorðin.

Smittuhiti	7
Smittuhiti við knútarósin	1
Smittuhiti við knútarósin og at kalla samstundis lungnatrota og lungnahinnubruna við vatni vinstrumegin	1
Smittuhiti við lungnatrota og turrum lungnahinnubruna	1
Tuberklar í eitlunum í lungnarótini og lungnatroti	3
Lungnahinnubruni við vatni høgrumegin	1
Lungnahinnubruni við vatni vinstrumegin og tuberklar í bringubeininum	1
Tuberklar í hálseitlunum	1
Børn,ið vóru fyribils hjástødd, og sum vit einki vita um	2
At vísa seg aldri verið tuberklasjúk	14
	32

2. *talva.* 32 børnini,ið smittað vóru við tuberklum.

Axel Poulsen (8) hevur 239 ikki burturúrvald nýsmittað tilkomin og børn, ið hóska væl til samanberingar. Av teimum høvdu 64% smittuhita, og 36% høvdu fingið pluss Pirquet uttan minsta sjúkdómsbragd.

Smittuviðurskifti og sjúkugongd verða her umrødd við fáum orðum. Yngsta av teim 32 smittaðu børnunum var 4 ára gl. genta, 14 vóru 5–9 ár og 17 meira enn 10 ára gomul. Fimm av børnunum í 2. talvu høvdu verið á sjúkrahúsi ella bróstsjúkrahúsi. Nøkur høvdu verið í Røntgen, og summar av sjúkuavgerðunum eru haðani. Tubbasteyrar eru ikki vístir hjá nøkrum barni. Ein drongur, sum hevði verið 14 ára gamal, tá ið heimbygd hansara varð kannað, doyði brádliga 1½ ára gl. av miliær-tuberklum. Hann var smittaður av pápa sínum, ið eisini smittaði ein annan son sín; hann er ímillum tey 32.

Annað av teimum fyribils burturstøddu smittaðu børnunum hevði havt smittuhita, og at kalla samstundis honum conjunctivitis phlyctænularis. Hitt barnið hevði neyvan havt nakra tuberklasjúku. Øll 34 børnini vóru frísk rannsóknarløtuna.

2. *Hjartabrek og bróstmøði.* Ein genta, 11 ára gomul, hevði álvarsamt, viðføtt hjartabrek, og longu tá ið hon var 6 mánaðir gl., var bringan avskapað, og hetta mentist við og við til eyðkenda kjølbringu og djúpar Harrisons foyrur. Ein onnur, 5 ára gomul genta hevði eisini álvarsamt hjartabrek, ið kann henda eisini var viðføtt. Men tað var ikki ávíst, fyrr enn við reglubundnu rannsóknunum: Bringa hennara sýndi tá somu broytingar sum hjá hinari gentuni, men ikki so týðuligar.

2 gentur, 10 og 13 ára gamlar høvdu ella høvdu havt bróstmøði. Fyrrnevnda var nakað kúlut í lendunum (kyphosis lumbalis). Hjá hinari var rættvorðna lendafettingin (lordosis lumbalis) at kalla burtur.

3. *Laurence—Moon—Biedl's sjúka.* Ein drongur, ið var 14 ára og 5 mánaðir gamal, hevði hesa sjúku við eyðkenninum fiti (hann var 155 cm høgur og vá 87 kg), reti-

nitis pigmentosa (sá illa í myrkri) og hypogenitalisme (skøpini smá, kynsbúningin enn ikki byrjað). Hevði har umframt havt polydactylia (11 fingrar og 11 tær).

4. Um tenninar. Tenninar hjá føroyskum børnum eru illa brendar. Í 3. talvu sæst støðan hjá 8 ymissum aldursbólkum.

Undir 1 ár			1–4 ár			5–9 ár			10–14 ár		
Tils.	Br. tenn	%	Tils.	Br. tenn	%	Tils.	Br. tenn	%	Tils.	Br. tenn	%
52	0	0	212	74	35	245	203	83	218	196	90
2–4 ár			**5–14 ár**			**1–14 ár**			**0–14 ár**		
Tils.	Br. tenn	%	Tils.	Br. tenn	%	Tils.	Br. tenn	%	Tils.	Br. tenn	%
160	69	43	463	399	86	675	473	70	727	476	65

3. talva. Børn við brendum tonnum í aldursbólkum.

Vit síggja á 3. talvu, at eingi børn undir 1 ár hava brendar tenn. Á 1–4 ára aldri eru 35%. Síðan ein øgiligur og brádligur vøkstur til 83% í næsta 5 ára tíðarskeiðinum (5–9 ár). Talið veksur í næsta bólki aftur, men ikki so nógv – til 90%. Hjá børnunum, ið eru 1–14 ára gomul eru 70%, og í bólkinum 5–14 ár eru 86%. Taka vit øll 727 børnini undir einum, fáa vit 65% við brendum tonnum. Ein fylt ella tikin tonn verður sjálvandi roknað upp í brendar tenn. – 14–1,9% – av hesum 65% høvdu fingið fyllu í sjúku tenninar. *Holst*[3] fann í 1936–37 av 182 børnum undir 17 ár við brendum tonnum bert 2, t. e. 1,1% við fyllu í holunum. Taka vit tey børnini, sum vóru tannleys, ella sum ikki høvdu brendar tenn, uppí, verður procentið upp aftur lægri.

Úr okkara tíð eru fleiri ritgerðir um tenninar hjá føroyskum børnum. Tær eru eftir *Rasmussen*[9] 1925, *Holst*[3] 1936–37, hon er nevnd omanfyri, og *Kofoed*[5] 1939.

Ritgerðin í 1925 er um eina lítla rannsókn viðvíkjandi brendum tonnum hjá 50 børnum í 2–4 ára aldri. 72% høvdu brendar tenn. Av teimum 727 børnum, ið kannað vóru í 1945–50, vóru 160 á hesum sama aldri, og teirra millum vóru bert 43% við brendum tonnum – sí 3. talvu. So prosentið hjá hesum smábørnum er frá 1925 til 1945–50 minkað ógvuliga nógv. Og enntá meira, lagt verður afturat í 1925: «Denne ødelæggelse af småbørnenes tænder var ofte voldsom. I gang fandtes materiefyldte blærer ved tandhalsene. Det var ikke sjældent blandt de 36 børn (72%) at finde 3–4–5 eller 6 tænder angrebne. 5 gange var halvdelen eller over halvdelen af de 20 børnetænder helt eller delvis ødelagte. Ret ofte fandtes af fortænderne i overmunden kun rodstumper tilbage». Rannsóknin vísti væl og virðiliga ikki bert, at prosentið við brendum tonnum hjá 2–4 ára børnum minkaði, men eisini at tenninar í 1925 vóru nógvar ferðir verri farnar enn í 1945–50. Tann mynd, tenninar tá vístu, er neyvan meira at finna nakrar staðir í Føroyum.

Á 3. talvu og niðanfyri her er ikki skilt ímillum barnatenn og vaksnamannatenn, heldur ikki ímillum dreingir og gentur, og vit vita einki um talið á sjúkum tonnum hjá einstaka barninum, og heldur ikki um tær tá vóru lítið ella illa farnar. Í *Kaabers*[6] og *Holsts*[3] ritgerðum frá 1936–37 eru hesi viðurskifti tikin við.

Í 1925 vóru, umframt oman fyri nevndu børnini á 2–4 ára aldri, eisini øll skúlabørn á Eiði kannað fyri brendar tenn tilsamans 100. Fýra av teimum høvdu fylt 14 ár, øll hini vóru 7–13 ár. 74 høvdu brendar tenn. Í 1947 varð aftur hugt at børnunum í sama skúla, og tey koma, saman við hinum børnunum í bygdini, upp í hesa uppgerð frá 1945–50. Tó vóru í skúlanum bert 62 børn, øll meira enn 7 og minni enn 14 ár. Ikki færri enn 92% høvdu brendar tenn, bert 5 børn høvdu frískar tenn. Í tey 22 árini, sum eru ímillum hesar báðar rannsóknir, er so talið á børnum við brendum tonnum í hesum skúla vaksið ógvuliga nógv: úr 74 og upp í 92%.

Í Holsts ritgerð frá 1936–37 koma uppí 2 bygdir í Eiðis læknadømi. Tær eru Gjógv og Elduvík. Tølini fyri brendar tenn síggja vit í 4. talvu, og tølini í somu bygdum í 1949 og 1946 eru í 5. talvu.

	0–6 ár			7–16 ár		
	Kannað børn	Við br. tonnum	%	Kannað børn	Við br. tonnum	%
Gjógv	16	12	75	26	26	100
Elduvík	4	1	25	10	8	80
Tils.	20	13	65	36	34	94

4. talva. Prosentið av børnum og ungum undir 17 ár við brendum tonnum við Gjógv og í Elduvík í 1936–37. Eftir J. J. Holst.

	0–6 ár			7–14 ár		
	Kannað børn	Við br. tonnum	%	Kannað børn	Við br tonnum	%
Gjógv	29	13	45	43	38	88
Elduvík	11	1	9	6	4	67
Tils.	40	14	35	49	42	86

5. talva. Prosentið av børnum undir 15 ár við brendum tonnum við Gjógv og í Elduvík í 1949 og 1946.

Holst hevur 15 og 16 ára gomul við í yvirliti sínum frá 1936–37 (4. talva). Hesir báðir árgangir koma alls ikki upp í rannsóknina í 1945–50; hon hevur bert børnini upp undir 15 ára aldur. Aftur at tí kemur, at unglingarnir og børnini hjá Holst eru skift sundur bert í 2 bólkar: 0–6 og 7–16 ár. Fullgildugur samanburður ímillum børnini undir 7 ár í hesum báðum bygdunum fæst tí bert við rannsóknunum í 1936–37 og 1949 og 1946.

5. talva hevur øll børnini við Gjógv og í Elduvík undir 15 ár, ið kannað vóru í 1949 og 1946, skift í 2 flokkar

— yvir og undir 7 ár — eins og børnini í Holsts ritgerð. Trúligt er, at Holst upp í børnini undir 7 ár bert hevur tikið tey, har ið tenninar vóru farnar at bredda. Er tað so, mugu vit draga tvey børn frá við Gjógv og tvey frá í Elduvík, tí her vóru tilsamans 4 av 6 børnum, øll undir 1 ár, tannleys (1,4, 5 og 9 mán.). Gjógv fær so 27 børn, av teimum høvdu 13 brendar tenn. Í Elduvík verða hesi tølini 9 og 1. Tá ið tey tannleysu verða drigin frá, fáa vit við Gjógv 48% og í Elduvík 11%. Sama um vit taka 48 og 11% staðin fyri 45 og 9%, so vísir samanburðurin ímillum 4. og 5. talvu, at talið á børnum undir 7 ár við brendum tonnum við Gjógv og í Elduvík er minkað at kalla niður í helvt hesi 10 árini ímillum rannsókn Holsts í 1936—37 og ta, sum framd varð í 1949 og 1946: Við Gjógv var batnað úr 75% niður í 45%, í Elduvík úr 25% niður í 9%. Leggja vit tølini saman í báðum bygdunum, bæði frá 1936—37 og 1949, 46, fáa vit við fyrru rannsókn 65% og við seinnu 35%.

Øðrvísi er við eldru børnunum. Prosentið við brendum tonnum frá 1949 og 1946 hjá børnunum yvir 7 ár og undir 15 ár við Gjógv og í Elduvík (5. talva) er eitt sindur lægri, enn samsvarandi tøl frá 1936—37 viðvíkjandi børnunum á 7—16 ára aldri (4. talva): 88 og 67 móti 100 og 80%. Orsøkin kann sjálvandi vera munurin á aldri hjá hesum báðum bólkum, ið bornir vera saman: 7—16 og 7—14 ár. Samanløgdu tølini á 4. og 5. talvu viðv. børnum á 7—16 og 7—14 ára aldri eru sambart Holsts rannsókn 94%, og sambart reglubundnu rannsóknina í 1949 og 1946 86%, tøl, ið eru at kalla eins stór.

Kofoed[5] fann í 1939, at 92% av børnunum í fólkaskúlanum í Klakksvík høvdu brendar tenn; hetta eru ætlandi børn 7 til 13 ára gomul. Talið hóskar væl við talið, ið fingið varð viðvíkjandi børnum á 5—14 ára aldri í Eiðis læknadømi í 1940—45: 86% (3. talva). Í millum- og realskúlanum, har næmingarnir munnu hava verið ímillum 11 og 15 ár, er talið 94%. Eisini hetta prosentið svarar væl til

tað her funna prosentið hjá 10–14 ára gomlum: 90% (3. talva).

6. talva er samandráttur av teim rannsóknum,ið her eru nevndar: Vit síggja her, at børnini í Eiðis læknadømi náttúrliga skiftast sundur í 2 bólkar: smærri og størri børn, markið er við 4–6 ára aldur.

		Smærri børn		
Ár	Kannað børn	Aldur	Við br. tonnum %	
1925	50	2–4 ár	72	Eiðis læknadømi
1936–37	20	0–6 „	65	(Holst) Gj. og Elduv.
1945–50	160	2–4 „	43	Eiðis læknadømi
1949, 1946	40	0–6 „	35	Gjógv og Elduvík
		Størri børn		
1925	100	7–13 (14) ár	74	Skúlin á Eiði
1936–37	36	7–16 ár	94	(Holst) Gj. og Elduv.
1947	62	7–13 „	92	Skúlin á Eiði
1949, 1946	49	7–14 „	86	Gjógv og Elduvík
1945–50	463	5–14 „	86	Eiðis læknadømi

6. talva. Heildaryvirlit. Tey kannaðu børnini: Kanningarárið, barnatalið, aldurin og prosent við brendum tonnum.

6. talva vísir, at tenninar hjá smærru børnunum í Eiðis læknadømi eru stórliga batnaðar, taka vit prosentið av børnum við brendum tonnum í tíðini frá 1925 til 1945–50. Í 1936–37 hóma vit batningina, men hon kemur sjónskari fram í 1945–50: Í 1925 høvdu 72 av 100 børnum brendar tenn, í 1936–37: 65 og í 1945–50: 35–43. Men hjá størru børnunum veksur talið við brendum tonnum ógvuliga nógv frá 1925 til 1945–50: úr 74 til o. u. 90%.

Ikki er heilt lætt við vissu at vísa á, hví so stórur munur er í 1925 og 1945–50 á tonnunum hjá smábørnunum í

Eiðis læknadømi. Men tó kunnu vit benda á eitt,ið eftir øllum líkindum hevur havt týdning — hevur kann henda gjørt allan munin.

Ein stórur partur av børnunum í Føroyum hevur uttan iva í langar tíðir fingið lýsi; og ikki bert tey,ið illa trivnaðust, men í mongum húsum øll børnini tey fyrstu barnaárini. Lýsi gjørdu tey sjálv. Í 1883 kom apotek í Havn. Hetta gjørdi broyting í og lýsigerðin heima minkaði við og við. Í 1920 og nøkur ár frameftir var at kalla oyði við fisk undir Føroyum. Útróðurin minkaði tí burtur í einki at kalla *(Kampp*[11]*)*; tað gav at bíta eisini í bygdunum í Eiðis læknadømi, — tað kann høvundurin av sonnum vátta.

Hetta hevði við sær, at lýsi nú var rárt at fáa. Lýsigerðin á bygdunum helt vitiliga heilt uppat. Apotekið sigur ferð eftir ferð í 1920—25, at tað hevur einki lýsi, ætlandi tí, at tað ger sjálvt lýsi, men fær onga livur. Tað er alls ikki óhugsandi, at orsøkin til tær vánaligu tenninar hjá smábørnunum í 1925 er hetta lýsitrotið. Menn hava leingi vitað —ið hvussu er síðan 1934 *(Mellanby*[12]*)* — at lýsi (D-vitamin) er neyðugt, skulu tenninar vaksa, sum tær eiga. Hetta fiskaloysi vardi í fleiri ár; men so kom fiskur aftur á grunnarnar, og lýsi var aftur at fáa á apotekinum. Vit undrast tí á, at Holst so seint sum í 1936—37 við Gjógv og í Elduvík fann so stórt tal við brendum tonnum, 65% av børnunum undir 7 ár. Framburðurin frá 72% í 1925 var lítil og minni, enn vit høvdu væntað eftir tí,ið omanfyri er greitt frá.

Hetta heldur høga talið hjá Holst kann tó í ein mun stava frá tí, at hann neyvan hevur tikið tannleysu børnini á 0—6 ára aldri við. Var tað, hevði talið verið lægri. Aftur at tí kemur, at Holst kannaði bert 20 børn í hesum báðum bygdunum. Tilvild hevur tí væl kunnað havt avgerandi týdning.

Nú kann onkur halda, at tannlæknin prof. J. J. Holst kann hava funnið fleiri børn við brendum tonnum enn bygdalæknin. Hetta man tó ikki vera. Hjá teim størru børn-

unum veksur talið hjá teimum við brendum tonnum sum nevnt frá 74% í 1925 til o. u. 90% í 1940–45. Her er sera lítil munur á tølum Holst's frá 1936–37 og teimum, sum funnin eru av lækna.

Tað undrar ongan, at vánaligu tenninar hjá 2–4 ára børnunum í 1925 koma samstundis við, at eingilsk sjúka ger øgiliga nógv um seg við bæði mongum og ringum tilburðum *(Rasmussen[9])*.

At prosentið hjá stórum børnum við brendum tonnum, mótsett hjá teim smærru, er hækkað almikið í 20–25 ára skeiðinum frá 1925 til 1945–50 er ivaleyst av støðugt vaksandi mjøl- og sukurnýtsluni. Rannsóknin í 1945–50 fór fram beint eftir kríggið. Føroysku børnini yvir 7 ár tykjast ikki at hava fingið betri tenn í kríggsárunum ella beint aftaná – tvørtur ímóti.

Umframt brendar tenn er onnur nógv sjáldsamari, men ógvuliga sjónsk broyting við summum av kannaðu tonnunum. Tað eru eyðkendar foyrur á tonnini, altíð tvørturum, tær eru 1–2 mm breiðar, eitt sindur óslættar í botninum, og eru ætlandi 1/2–1 mm djúpar. Tær eru týðiligar at síggja varramegin á tonnunum og á liðunum, men hómast eisini tungumegin. Tær gera rætt og slætt ringar rundan um tonnnia. Foyrurnar, ið altíð eru á meira enn einari tonn, eru at síggja bæði á barnatonnunum og vaksnamannatonnum. Tann parturin av tonnini, sum er uttan fyri ringarnar, er stundum smalri enn tann, ið situr fastur í tannhaldinum.

Orsøkin til hesar ringar er ófullfíggjaður kostur onkuntíð, meðan tanngleringin gjørdist. Tí eigur eitt sindur at vera sagt um teir, hóast teir bert eru hjá 6 børnum av 727; tey eru: Ein drongur og ein genta sum vóru ávíkavist 14 og 13 ára gomul, 3 dreingir ímillum 6 og 11 og ein 5 ára gl. genta, Tvey tey fyrstu høvdu mist allar barnatenninar, so tey høvdu bert vaksnamannatenn. Teir 3 dreingirnir høvdu bæði barnatenn og vaksnamannatenn, men foyrurnar vóru bert í vaksnamannatonnunum. 5 ára gentan hevði 20 barnatenn, sum allar samlar høvdu ringar.

Vita vit, hvar í tanngarðinum tær brekaðu tenninar standa,

og hvussu langt ið er frá foyrunum og út í tanneggina ella tannfilparnar, ber til, tó trupult er, at finna tíðina, tá ið ófullfíggjaði kosturin nervaði tenninar. Men her verður ikki farið undir tílíka útrokning. Vit vita einki um, at nakað av hesum 6 børnunum hevur havt eingilska sjúku, og einki sást til tær avskapingar, sum vanliga benda á hesa sjúku; men øll høvdu brendar tenn. — Mangar aðrar sjúkligar broytingar vóru við tonnunum hjá hesum 727 børnum enn brendar tenn og hesar nevndu foyrur, eitt nú skeivar tenn, svørt helsi um tannhálsarnar, blettir á tanngleringini, tenninar óslættar uttan og tannsteinur.

5. *Miðoyrnabruni og hoyrnin.* Av øllum 727 børnunum høvdu 79 (42♂, 37♀) havt miðoyrnabruna; hjá 13 hevði ikki runnið útúr. Viðvíkjandi hinum 66 var runnið útúr báðum oyrunum hjá 26, bert úr høgra oyra 24 og bert úr vinstra hjá 15. So var eitt barn, sum lækrin ikki hevði verið hjá, og har tey ikki mintust, um tað var úr høgra oyra ella vinstra, at vágur var runnin útúr. Hjá summum av børnunum hevði runnið útúr fleiri ferðir, og fýra teimum aftur høvdu ætlandi varandi brunasótt. Hjá ongum barni rann út úr oyrunum, tá ið rannsóknin fór fram.

Tá ið kannað varð við uri og teskan, vórðu funnin 4 børn, ið hvørgumegin hoyrdu væl: Eitt barnið hoyrdi til helvtar minni enn tað átti, hjá hinum 3 var hoyrnin minkað nakað, men ikki so nógv sum hjá tí fyrsta. Hjá 5 børnum var hoyrnin viknað eitt lítið sindur, heilt lítið øðrumegin. — Afturat teim 79 kom ein drongur, sum 8 mánaðir gl. varð skorin fyri mastoiditis høgrumegin; rann ongantíð útúr. Hoyrir nú væl.

6. *Nalvalop.* Av hesum 727 børnunum, sum koma upp í hesa rannsókn, vóru 52 yngri enn 1 ár. Fýra teirra høvdu nalvalop og eitt hevði havt — tilsamans 5 el. 10%.

Somuleiðis vóru 52, ið vóru 1 ár, men ikki høvdu fyllt 2 ár. Trý teirra høvdu nalvalop, t. e. 6%. Einki er frískt aftur, tað vit vita.

Joensen[4] kannaði fyri fáum árum síðan 104 frísk børn á

2–6 ára aldri í barnagarði Drottning Ingridar í Havn og fann 2, 2%, við nalvalopi. Hjá 8 av børnunum stóð nalvin nógv út, uttan at víst kundi vera á nalvalop.

Henda rannsókn hevur tilsamans 273 børn á hesum sama aldri (2–6 ár). Teirra millum høvdu 19 nalvalop (7%) og 9 høvdu havt, tilsamans 28 el. 11%.

350 børn vóru 7–14 ára gomul. 5 teirra høvdu nalvalop: Trý 8 ára gomul, eitt stívliga 9 ár og eitt eitt sindur yvir 14 ár. 16 á hesum aldri høvdu verið viðgjørd fyri nalvalop, sum nú var burtur. Tilsamans 21 ella 6%.

Taka vit nú hetta saman fáa vit: 727 børn kannað, øll undir 15 ár, í tíðarskeiðinum 1945–50. Av teimum høvdu 31 (4+3+19+5) nalvalop, og 26 (1+0+9+16) høvdu havt, men tað var horvið. 57 (31+26) av 727 verða 8%. Hetta talið er ætlandi ov lágt, tá ið vit geva gætur eftir høga prosentinum fyri børn undir 1 ár (10%) og tey ímillum 2 og 6 ár (11%). Rætta talið man vera nærri 10%. Av teim 57 børnunum, sum høvdu ella høvdu havt nalvalop, vóru 27 dreingir og 30 gentur.

Øll her nevndu 57 børnini vóru borin í heim rættstundis, eitt undantikið; tað kom 5 vikur fyri tíðina. Nalvalop varð ávíst stutt eftir føðingina, men tað hvarv skjótt burtur aftur. Nærum øll nalvalopini komu fram stutt eftir, at barnið er borið í heim. 2 ferðir mundi kykhosti vera atvoldin ella ein atvold. Eitt av hesum nevndu nalvalopum var paraumbilicalt.

Ein nærum 4 ára gamal drongur, ið hevði havt nalvalop frá tí, hann var borin í heim at kalla, var skorin fyri tað, tí hann gramdi seg um pínu í búkinum og legði seg niður á bøin, tá ið pínan kom til at fáa linna. Ongar samangrógvingar vóru funnar, tá ið skorið varð; men hann gramdi seg onga tíð aftur.

Sum nevnt omanfyri vóru 26 børn, sum høvdu havt nalvalop, ið var horvið, tá ið rannsóknin fór fram. Hvussu er so við arrunum, ella vit kunnu spyrja: Hvussu grør nalvalop aftur? 19 av teim 26 høvdu frískar nalvar, og 7

har nalvin ikki var reiðiliga rættvorðin Hjá 3 teirra stóð húðin út sum lítil tómur posi, men har var hvørki tarmur, netja ella op at finna. Hetta hevur helst verið sama nalvaslag sum teir 8, *Joensen*[4] skrivar um. Hetta bendir tó ikki altíð á afturgrøtt nalvalop — alls ikki; tí tað var at síggja hjá 10 børnum, har hvørki móðir ella lækni vistu nakað,ið bendi á gamalt lop.

Í nalvanum hjá 3 av hinum 4 kendist ferhyrnd tvørsprunga, o. u. 3×12 mm, og við ógvuliga týðiligum og furkutum tromum. Fjórða barnið, nærum 15 ára gl. drongur, hevði nalva av sama slag sum hesi 3, men opið var nógv minni — bert o. u. 2×6 mm. Hjá 3 ára gl. gentu, sum ikki hevði havt nalvalop, sást op eins stórt og hjá hesum nevnda dreingi. Henda eyðkenda tvørsprungan, so týðiliga avmarkað og við so tjúkkum veggjum, er so heldur ikki altíð arr eftir afturgrøddum nalvalopi.

7. *Tarmalop í lærkreppingini.* 11 børn (8♂, 3♀) høvdu havt røralop. 10 av teimum vórðu skorin fyri tað, áðrenn tey fylltu 6 ár. Hjá 11. barninum — einum dreingi — hvarv lopið aftur sjálvt, innan 2 ára aldur. Ein av teim 8 dreingjunum varð, áðrenn hann fyllti 3 ár, skorin høgrumegin og 2 ár seinni eisini vinstrumegin. Við reglubundnu rannsóknini varð funnin enn ein tilburður. Næstan 7 ára gamal drongur, sum illgruni hevði verið um 3 ár frammanundan, at hann hevði tarmalop, men ógjørligt tá at fáa vissu fyri tí. Nú var eingin ivi, og fáar mánaðir seinni varð hann skorin. Hetta vóru so 12 børn (9♂, 3♀) við tarmalopi, og hjá øllum røralop.

8. *Afturhildin eistu.* Hjá 2 dreingjum (6 og 8 ár) merktist høgra eista alls ikki. Hjá 3 øðrum (9, 11 og 12 ár) lá annað beint framman rørunum, og hjá einum stívliga 3 ára dreingi var skølpurin tómur, meðan bæði eistini lógu á áðurnevnda stað.

9. *Brunasótt í ágørnini.* 2 dreingir vórðu 12 og 14 ára gamlir skornir fyri bráða brunasótt í ágørnini, — hjá eldra dreinginum var hol komið á ágørnina.

10. Trý børn høvdu við reglubundnu rannsóknini *craniotabes.* Tey vóru 6, 4 og 3 mánaðir gomul. Elsta barnið var drongur, har craniotabes var funnið 2 mánaðir undan hesari kanning. Hini tvey vóru gentur, og hjá teimum var craniotabes funnið við rannsóknini. Um 6 mánaðir gamlan drong eitur, at hann hevði *stóra ferstrenda høvuðskeldu,* hon var 3×3 cm. Um 30 børn er viðmerkt: *bungut tubera parietal.* Sundurskiftingin eftir aldri er eitt sindur øðrvísi enn vit høvdu væntað (7. talva).

		♂	♀
Minni enn 2 ár	3	(2	1)
2– 4 „	11	(6	5)
5– 9 „	12	(6	6)
10–14 „	4	(3	1)
0–14	30	(17	13)

7. *talva.* Børnini við bungutum tubera parietalia skift sundur í aldursbólkar.

2 dreingir (3 og 7 ár) høvdu *bungutar tubera fronialia,* har umframt høvdu teir stórar tubera parietalia, og eru tí eisini í 7. talvu. Á bringuni hjá gentu, 1 ár og 9 mánaðir gomul, sást týðiligur *rósinkransur.*

11. Harrisons foyra. Í hesi rannsóknini eru sum nevnt 353 dreingir og 374 gentur. 51 dreingir og 44 gentur høvdu Harrisons foyruna, og verða tað ávikavist 14 og 12%. Tilsamans 727 børn, og av teimum 95 við Harrisons foyru, tað verða 13%.

Bert 7 (1♂, 6♀) av hesum 95 børnunum hava fingið viðmerkingina «greflig» Harrisons foyra. Allar hinar vóru smáar — einstakar so veikar, at tær eru lýstar við orðunum «ógviliga smáar», «so tær varnast», «bert eiti av foyruni»; men hjá ongum barni tó ivi um, at bringan er merkt av hesi smávegis avskapan.

Ógviliga løgið er at síggja, at Harrisons foyra hjá ikki

færri enn 24 av 95 børnum (26%) bert var øðrumegin, og nógv oftari vinstru- enn høgrumegin (lutfallið 20:4). Hjá 10 av teim 71 við Harrisons foyru báðumegin var týðiligt, at foyran vinstrumegin var djúpari enn tann høgrumegin. So bringan vinstrumegin var nógv meira merkt av Harrisons foyru, enn høgrumegin.

12. Kjølbringa. Hjá 24 børnum (11♂, 13♀), táið tey vórðu kannað, rendust niðasti partur av bringubeininum og rivjabeinini har eitt sindur fram, og var hetta uttan iva kjølbringa, hóast broytingarnar ofta vóru ógviliga smáar. Men so vóru 12 børn (3♂, 9♀),ið vóru týðiliga avskapað, høvdu eyðkenda kjølbringu, sum tó ikki altíð kom líka langt fram báðu megin. Tilsamans 36 børn (14♂, 22♀) við kjølbringu og verða tað 5%.

13. Ketilbringa sást hjá 3 børnum (1♂, 2♀). Hjá ongum teirra var kullan so ógviliga breið ella djúp.

14. Bringubeinsendarnir á rivunum standa út. Hjá 33 børnum (16♂, 17♀), 5% av øllum, stóðu bringubeinsendarnir á rivunum út, annaðhvørt øðru- ella báðumegin, so har gjørdist krappari ella gævari bogar. Táið broytingararn vóru báðumegin — og tað vóru tær hjá 17 av teim 33 — líktist bringubeinið, sum at vísa seg var rætt vorðið, botninum í grunnum, flatbotnaðum báti, botnurin breiður sum bringubeinið, og uppbendu rivini gjørdu síðurnar. Tað vóru altíð fleiri riv,ið uppbend vóru — oftast 3. til 6.; men stundum sóust at vera enn fleiri og í einstøkum føri færri. 1. ella 2. riv var stundum hitt ovasta, og 7. var niðasta.

16 børn (48%) høvdu broytingarnar bert øðrumegin: 12 høgrumegin, 4 vinstrumegin. Hjá 5 børnum av teim 17 við bogunum báðumegin, vóru teir størri og meiri høgrumegin enn vinstru. Eingin vinstrubogi var størri enn tann yvirav. Hesar avskapingar, tærið eru øðrumegin, og tærið eru meiri øðrumegin, eru, mótvegis Harrisons foyru, týðiligari høgrumegin enn vinstru.

25 av 33 børnunum við uppbendu bogunum vóru undir 8 ár. So tað eru helst yngru børnini,ið merkt eru. Hetta

kundi týðað uppá, at avskapningin ofta hvørvur við tíðini, brekið er tó eisini ávíst hjá 13—14 ára gomlum børnum. Einki av hesum 33 børnum hevði ketilbringu.

15. Hjólbeintur. 13 (9♂, 4♀) av teim kannaðu 727 børnunum vóru hjólbeint; oftast rakk hjólingin úr mjødn í fót. Um eini tvey eitur, at hjólingin var lítil; men hjá teim allarflestu var hon ógviliga sjónsk. Einar tvær ferðir er viðmerkt, at barnið tvinnaði.

16. Kálvakníggjaður. 6 børn, alt gentur, vóru kálvakníggjað.

17. Høgrarend ryggbending (dextraconvex scoliose). 2 gentur høvdu høgrarenda ryggbending. Hjá aðrari rakk bogin úr 6. til 11. geisla, og frá 12. geisla helt hann fram vinstrarendur niður ígjøgnum lendarnar.

18. Vinstrarend ryggbending (sinistroconvex scoliose). Tað vóru 26 (8♂, 18♀) børn við lítlari vinstrarendari ryggbending, og har umframt 2 børn, bæði gentur, við meira krappari ryggbending sama veg.

19. Kúla á bakinum. Millum tey 727 børnini vóru 18 (8♂, 10♀) eitt lítið sindur kúlut, og ryggurin her so stirvin, at hann rættist ikki upp. Kroppsburðurin hjá teim flestu vánaligur og høvdið lútandi.

20. Eingin fetting. Hjá ikki heilt fáum børnum, 23 (5♂, 18♀) var lendafettingin nógv flatnað, heilt burtur, ella flá kúla kom staðin fyri.

21. Ovmikil lendafetting sást hjá 5 børnum (3♂, 2♀).

Stykkini við talmerkingini 11—21 hava tilsamans 262 avskapingar av bringuni, beinunum, rygginum og lendunum, ávístar hjá 187 av teimum 727 kannaðu børnunum. Verða tær 4 genturnar í 2. stykki lagdar afturat — tær sum høvdu 6 avskapingar — verða tilsamans 268 avskapingar hjá 191 børnum. Fjórða hvørt av teimum 727 børnunum (26%), sum øll vóru undir 15 ár, høvdu so eitthvørt frávik frá rættvorðnum. Vit mega her ikki gloyma, at flestu av hesum frávikum vóru smá. Stórur partur av teimum verður ivaleyst varandi alt lívið; tí flestu av teimum 191 børnunum vóru so gomul, at eingin vón er um nakra broyting.

Her má tilskilast, at fýra av teim sera týdningarmiklu lógunum í Danmark frá 1937—46 galda ikki fyri Føroyar. Tað er lóg um heilsu hjá konu, ið gongur við barni, um fyribyrging av sjúku og deyða hjá pinkubørnum, um fyribyrgjandi heilsurannsóknir av 1—7 ára gomlum børnum og lóg um skúlalæknar. Høvdu hesar lógir verið gjørdar at galda í Føroyum, hevði kann henda mangt verið øðrvísi, og sloppið hevði verið undan mongum av oman fyri nevndu avskapingum.

22. Slættiljaður. Føturnar á øllum teim rannsakaðu børnunum eru kannaðir og vátt fótafar tikið, hvørja ferð minsti illgruni var um slættil.

Pinkubørnini og tey heilt ungu børnini hava feittfyllu undir ilini, ilin er tí sløtt, og fótafarið líktist slættilini. Eingi børn undir fimm ár eru tí tikin við her í fyrstu uppgerðini. Av eldri børnum eru tilsamans 17 (11♂, 6♀), 4% av 463, og teirra millum ein 13 ára drongur, ið var slættiljaður bert høgrumegin. Uppi í hesum 17 eru trý 5 ára gomul (2♂, 1♀) og tvær 6 ára gamlar gentur. Tey eru fleiri, enn vit høvdu hugsað av hesum 2 yngstu ársnøringunum. Sjey, ið fylt høvdu 3 ár og fimm, ið vóru 4 ára gomul, høvdu slætt iljafar. Bera vit saman stóra talið av slættiljaðum á 3—6 ára aldri, 17 (7+5+3+2), við nógv lægra talið hjá teim 8 ársnøringunum yvir 6 ár, mega vit ætla, at allraflestu av hesum smáu børnunum enn hava pinkubarnaslættil, og at bati er væntandi.

23. Calvé- Legg- Pertles sjúkuna hevði 11 ára gomul smágenta við sjúkueyðkenni frá tí, hon var 8 ár.

24. Sjúka Osgood—Schlatters sást hjá 2 gentum, 14 og 12 ára gomlum. Hjá aðrari vinstrumegin, hjá hinari høgrumegin. Ein 12 ára gl. drongur hevði somu sjúku báðumegin.

25. Ichthyosis og Psoriasis. Ichthyosis sást hjá 4 ára gamlari gentu og hjá 2 brøðrum (8 og 13 ár). 3 gentur (allar yvir 12) høvdu psoriasis. Hendan sjúkan er víða um í Føroyum, og *Lomholt*[7] hevur skrivað gjølliga um hana.

26. Diabetes mellitus var ávíst hjá 10 ára gentu búði,

fyribils hjá skyldfólki í Eiðis læknadømi. Hon bevði havt sjúkueyðkenni í o. u. hálvt ár.

27. *Pellagra.* 6 børn í 3 ymissum húsum hvørt í síni bygd høvdu eftir øllum líkindum havt pellagra. — Í 1. húsinum var ein at kalla 15 ára gomul genta, og tunga hennara var í februar 1949 (gentan tá 13½ ára gl.) ógvuliga tjúkk, fagurt reyð, øll avtikin og far eftir tonnunum fram við tungujaðrinum. Harumframt var illa sundurstokkið í kinnklovunum, og húðin á albogunum og knøunum var rúrut og heldur døkkari enn hon átti. — Í 2. húsinum við 4 børnum hevði í juli 1942 ein 9 ára gl. drongur eins og oman fyri nevnda genta, tjúkka, fagurreyða tungu og í tunguni lagdir fullar við hvítum, smølum, leysum skónum. Oman á tunguni sást eisini merki eftir stórum, at kalla heilt avfarnum hvítum skónum. Slímhinnan var sum tungan, ógviliga reyð. Einki støkk í kinnklovunum og heldur ongar broytingar í húðini. 17 ára gamal bróðir hansara hevði hesumlíkar broytingar í munninum og á tunguni og var har umframt sundurstokkin í kinnklovunum. — Í 3. húsinum vóru 6 børn, og av teimum høvdu 3 (11, 9 og 2 ár) í mars 1947 broytingar í húðini á albogunum og knøunum; tó at einki var við tunguni ella munninum, bendi hetta avgjørt á pellagra. — Hesi nevndu sjúkubrøgd hvurvu skjótt, tá ið tikið varð nicotinsýra og gertablettir. Tá ið regluliga rannsóknin fór fram í hesum 3 bygdunum ávikavist í 1950, 1945 og 1949 vóru munnurin, tungan, kinnklovarnir og húðin hjá teimum børnunum, sum tey áttu.

28. *Kynbúningin* fer fram eftir lógbundnum reglum og røkkur um fleiri ár.

Hjá dreingjum byrjar kynmenningin við, at eistuni fara at vaksa. Beint aftan á tað veksur sinin, og at kalla samstundis eru at síggja strálvaksin, stutt, ljós hár um ytru skøpini; tey víkja skjótt fyri tjúkkari, litaðum sløttum hárum. Eistu og penis halda á við at vaksa. Hárini verða tættari og purlut. Litað, grov hár koma undir hondina; at kalla samstundis tí eigur ein at kunna finna livandi sáðkyknur í landinum.

Hjá gentum ber ikki til at kanna eggbøllarnar, tey yrkisgøgnini ið samsvara eistuni hjá dreingjum. Vit hava tí her bert við at gera ytru merkini fyri kynbúningini. Fyrsta sjónska broytingin er, at vørtubletturin kemur fram. Síðan koma hár til sjóndar um ytru skøpini, fyrst heilt fá, stutt, fín og ólitað, síðan litað og sløtt, og tey verða fleiri og fleiri í tali; víkja so fyri øðrum purlutum hárum. Bróstini fara at vaksa. Purlut hár koma undir hondina, og at kalla samstundis kemur mánasjúkan fyrstu ferð.

Frávik frá hesi nevndu gongd eru ikki heilt sjáldsom, bæði hjá dreingjum og gentum, vit hava eisini hitt tey við hesi rannsókn.

Nú kann onkur spyrja: Hjá hvussu mongum av teim 727 børnunum, ið eru við í hesi rannsókn, og sum øll eru undir 15 ár, var kynbúningin byrjað, og hvussu mong teirra aftur vóru fullbúgvin. Svørini síggja vit niðanfyri. Á 8. talvu eru 97 dreingirnir og 121 genturnar á 10—14 ára aldri, sum eru uppi í hesi rannsókn, tikin sundur í 10 bólkar.

Eingin drongur yngri enn $10^1/_2$ ár og eingin genta undir 10 ár sýndu ferilin av kynbúning. Talvan vísir, at 2 dreingir í 2. bólki ($10^1/_2$—11 ár), 15 %, høvdu tekin upp á kynbúning. Í 3. bólki (11—$11^1/_2$ ár) var eingin. Hiðani økist prosentið til 15 ára føðingardagin. Tá er tað 100. At økingin ikki er jøvn, kemur ivaleyst av tí, at tølini eru so smá. Prosentið hjá gentum var 20 longu fyrstu 6 mánaðirnar eftir 10 ára føðingardagin. Síðan veksur tað — hóast smáu tølini — at kalla javnt og verður frá og við 12—$12^1/_2$ ára aldri 100.

Taka vit — viðvíkjandi dreingjum — purlut hár undir hondini sum tekin uppá kynbúning, síggja vit, at bert 6 av teimum 97 vóru komnir so langt. Yngstur teirra var knappliga 14 ár, hinir fimm millum $14^1/_2$ og 15; 5 av 13 verða 38 %.

Hjá gentunum vísir fyrsta mánasjúka, ið jú kemur samstundis hárum undir hondini, væl og virðiliga, at full kynbúning er fingin. Ein stívliga $11^1/_2$ ára gl. genta var hin yngsta við mánasjúku (1 av 17), næstyngsta var stívliga $12^1/_2$

ár (1 av 17). Síðan í trimum næstu bólkum 33% (2 av 6), 64% (9 av 14) og 43% (3 av 7) og at enda 72% (13 av 18) í 6 mánaðunum innan 15 ára føðingardag.

Aldur	10–10½		10½–11		11–11½		11½–12		12–12½	
	♂	♀	♂	♀	♂	♀	♂	♀	♂	♀
Tilsamans,	8	10	13	14	7	10	16	17	3	8
harav í kynbúning	0	2	2	6	0	5	7	13	2	8
%	0	20	15	43	0	50	43	76	67	100

Aldur	12½–13		13–13½		13½–14		14–14½		14½–15	
	♂	♀	♂	♀	♂	♀	♂	♀	♂	♀
Tilsamans,	12	17	8	6	9	14	8	7	13	18
harav í kynbúning	11	17	6	6	9	14	7	7	13	18
%	92	100	75	100	100	100	88	100	100	100

8. talva. Kynbúningin hjá 10–14 ára børnunum.

Purlut hár undir hondini hjá dreingjum er als ikki so gott mark ímillum byrjandi og fulla kynbúning sum mánasjúka hjá gentum, men hetta er tað einasta, ið nýtast kann í rannsókn sum hesari.

Tvær ritgerðir eru um fyrstu mánasjúku hjá føroyskum gentum: Tølini hjá landkirurg Petersen í *Hannovers*[2] ritgerð frá 1865 og grein *Bergs*[1] prentað 1870. Hin fyrri spurdi 61 konufólk og fekk miðaltalið fyri 1. bløðing at vera 16,62 ár; um aldurin hjá hesum konufólkum verður bert sagt, at «6 koner var over 40 år (42–49)», at «af 61 var 11 gifte og havde 1–11 børn». Berg fregnaðist hjá 122 konufólkum «af hvilke de 37 var gifte, mødre til 130 børn». Miðalaldurin fyri 1. bløðing var 16,13 ár. Um aldurin á teimum, sum spurdar vóru eitur: «Hos 8 individer var menses endnu til stede, da jeg sidste gang så dem. Deres alder var fra 51,50 til 44,00».

SUMMARY

State of Health of the Children in the Medical District of Eiði, Faroes.

All children under 15, 727 in all (353♂, 374♀), were examined in the 6 years from 1945 to 1950.

In 1945 the author of this article had for 25 years been the panel doctor of the above-mentioned district, the children of which constitute the material for this work. Consequently case books of nearly all the children were kept. The results of the examinations were compared with the information of the case books about former diseases. What is stated below is therefore a great many things about the health of the children from the cradle to the day of examination.

32 children, 4%, had a positive tuberculin test. 16 of these had passed through initial fever or others of the tuberculous diseases usually setting in shortly after infection; the other 16 had had no symptoms. All the children were well at the time of examination.—2 girls had organic heart disease, one—perhaps both of them—born with it. 2 other girls had asthma. 1 boy Laurence- Moon- Biedl's Disease.

No child under 1 had caries; but of those 1 to 4 years old, 35%, of those 5 to 9 years old, 83%, and of those 10 to 14 years old, 90%. A comparison between this examination and previous ones brings about the conslusion that the teeth of the small children are now much better then formerly, those of the big ones worse: among the children of 2 to 4 years there were 72% with caries in 1925, in 1945—50, 43%, among the former much more violent then among the latter. Among the children of 7 to 14 years the percentage was 74 in 1925, now about 90. In 1920 and the following years the sea round the Faroes was almost devoid of fish, and cod liver oil, therefore, a rare article. This circumstance was probably the cause of the bad teeth of the small children in 1925.

79 children out of 727 (11%) had had inflammation of the middle ear (otitis media). No child with flux during the examination. 9 children had a certain reduction of hearing in one or both ears.—About 10% of the examined children had or had had umbilical hernia in the first months of living. Most of the hernias disappeared in time. Only 1 child of those 10 to 14 years old had umbilical hernia.—11 children had been operated for inguinal hernia, all of them before they had completed their 6th year. Moreover, 1 boy of seven whose hernia was discovered at the examination.

95 children, 13%, had Harrison's furrow. 24 of these, 26%, had it only on one side, and especially on the left-hand one (the ratio 20 to 4). 10 out of the 71 with Harrison's furrow on both sides had a deeper furrow on the left-hand side of the breast than on the right-hand one

(the ratio 10 to 61).—36 out of 727, 5%, had pigeon-breast, and 3 funnel chest.

Most of the above-mentioned deformities were little marked.

The sternal ends of some of the ribs (most often 3rd to 6th) curved outwards on one or both sides on 33 children, 5%. More often row of curves on the right-hand side than on the left-hand one. If the curves were on both sides, they were often more marked on the right-hand side than on the left-hand one.—13 children were bow-legged, 6 knock-kneed, 2 had dextro convex scoliosis, 28 sinistro convex scoliosis, 18 mild kyfosis, and with 23 lordosis was obliterated. Too deep lordosis was seen 5 times.

Diabetes mellitus was shown in a 10 year old girl.—6 children from 3 different homes had had mild symptoms of pellagra; they were fit on the day of examination.

72% of the girls in the last 6 months before their 15th birthday had had menses. 38% of the boys at the same age had fully developed hirci.

BÓKMENTIR

1. *Berg, Adolph*: Nogle Bemærkninger om Menstruationen hos Færinger. Bibliotek for Læger. 5. Række. 20. Bind. Kbh. 1870. Bls. 307—316.
2. *Hannover, Adolph:* Undersøgelser angaaende Menstruationen i dens normale Tilstand og i dens Forhold til Sygdomme. Kbh. 1865. Heri nogle Meddelelser fra Landchirurg Petersen. Bls. 52—54.
3. *Holst, J. J.:* Tandundersøgelser i P. Garl Petersens Fonds Ernæringsekspedition til Færøerne 1936—1937. Kbh. 1940. Bls. 294—492.
4. *Joensen, Hans Debes:* Um nalvalopið hjá pinkubørnum (Hernia umbilicalis infantum). Fróðskaparrit. 1. bók. Tórshavn 1952. Bls. 32—58.
5. *Kofoed, Sv. E.:* Skolelægevirksomheden í Klaksvig 1939 og sammenfattende Beretning for Aarene 1935—1939 incl. Norðlýsið 6. árg. No. 10 1940. Klakksvík. Bls. 1—3.
6. *Kaaber, Oscar:* Tændernes Tilstand og Tandpleje paa Færøerne i P. Carl Petersens Fonds Ernæringsekspedition til Færøerne 1936—1937. Kbh. 1940. Bls. 282—293.
7. *Lomholt, Gunnar:* Psoriasis í Føroyum. Fróðskaparrit 2. bók. Tórshavn 1953. Bls. 129—150.
8. *Poulsen, Axel:* Eitt sindur um tuberklasmittuna. Fróðskaparrit 1. bók. Tórshavn 1952. Bls. 59—103.

9. *Rasmussen, R. K.*: Rachitisundersøgelser i Ejde Lægedistrikt paa Færøerne. Bibliotek for Læger 117 Aarg. Kbh. 1925. Bls. 382–385.
10. *Rasmussen, R. K.*: Pirquetundersøgelser í Ejde Lægedistrikt paa Færøerne. Hospitalstidende 74. Aarg. Kbh. 1931. Bls. 926–934.
11. *Kampp, Aa. H.*: Færøerne, Folk og Erhverv. Kbh. 1950. Bls. 45.
12. *Mellanby, Edward:* Nutrition and disease. London 1934. Bls. 15–29.